

Norski oljumálaráðharrin, Tord Lien. Mynd:Frp

# Noreg: Fara at leita eftir olju beint við russiska markið

**Jógvan Hugo Gardar**

20.01.2015 - 12:56

Oljan.fo

Norski oljumálaráðharrin, Tord Lien, hevur í dag boða frá einum uppskoti um hvørji nýggj leitiloyvir tey arbeiða við í Barentshavinum.

Hann boðar frá at øll økini sum oljufeløgini hava víst áhuga fyri, nú skulu lýsast út, so oljufeløgini kunnu bjóða seg fram til at fara at leita eftir olju og gassi á nýggjum økjum.

Nú ynskir norska stjórnin at bjóð eitt nýtt leitiøki har eystur í Barentshavinum, heilt eystur móti russiska markinum. Hetta verður gjørt sjálvt um bæði servitan og umhvørvisbólkar ávara móti hesum.

Seinast Noreg lat upp eitt nýtt øki fyri oljuleiting var í 1994. Tord Lien vísir á at tað eftir øllum at døma eru stórar mongdir av gassi og olju í Barentshavinum sum enn ikki eru funnar. Hann leggur afturat at hetta kann fáa stóran týdning fyri búseting og vinnulív í Norður-Noregi, ein partur av Noregi sum Lien sjálævur kennir gott.

40 oljufeløg komu við uppskotum um økir sum tey kundu hugsa sær koma vi í einum leitiumfari. Talan er um 160 leitiøkir, harav 140 av teimum eru í Barentshavinum, meðan 20 eru á Norðhavinum (Norskehavet sum norðmenn kalla tað).